FØROYA HANDILSSKÚLI

## Handilsskúlin søkir eftir

# LÆRARUM

Treytað av ætlaðum virksemi søkir Føroya Handilsskúli eftir lærarum til HH og FHS í Tórshavn frá 1. august 2009. Talan er antin um tíðaravmarkað starv skúlaárið 2009/2010 ella um fast starv, um umsøkjari hevur útbúgving, sum hóskar til tørv skúlans.



Hesir tímar eru leysir at søkja (tímatølini standa í klombrum og eru vegleiðandi):

Altjóða búskapur (10 t/v), Danskt A (9 t/v), Dekoratión C (4 t/v), Enskt B (8 t/v), Fyriskipan A (4 t/v), Føroyskt C, A (8 t/v), Heimspeki C (4 t/v), Innovatión C (4 t/v), Mentanarfatan C (4 t/v), Sálarfrøði C (4 t/v), Støddfrøði C, B (15 t/v), Sølubúskapur C, B, A (21 t/v), Vinnulívsrættur C (9 t/v), Virkisbúskapur C, B (9 t/v).

Arbeiðsuppgávur:
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

Vit vænta, at tú:
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi.
- hevur viðkomandi útbúgving á bachelorstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi.
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við at menna skúlan

Vit kunnu m.a. bjóða:
- eitt fakligt mennandi læringsumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

Setanarkor til fast starv:
Tvey tey fyrstu árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum verða settir í fast starv, hava skyldu at undirvísa í teimum lærugreinum, teir hava førleika til, og mugu vera til reiðar at fara undir námsfrøðilga útbúgving.

Løn:
Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið, ella eftir avtalu.

Umsókn:
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 27. apríl 2009. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Olav Absalonsen ella Sonju Oyrabø Petersen á telefon 317177, teldupostur: oa@hsh.fo ella sp@hsh.fo.

FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 31 71 77
Telefax 31 33 74

www.fh.fo

Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 300 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH), sum er ein 3-ára gymnasial útbúgving, og umleið 200 á grundútbúgving innan Fyrisiting, Handil og Skrivstovu (FHS), sum tekur eitt ár, og gevur atgongd til lærlingasútbúgving og til 2-ára HH, har FHS telur sum tað fyrsta árið av trimum. Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast umleið 35 lærarar og á Kambsdali umleið 30. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri skrivstovulærlinga- og handilslærlingaútbúgving og fyri hægri útbúgvingum sum HD og akademiútbúgving.

FØROYA HANDILSSKÚLI

SENDISTOVAN

---

FØROYA HANDILSSKÚLI

## Handilsskúlin søkir eftir

# BÚSKAPARFRØÐINGUM

Treytað av ætlaðum virksemi søkir Føroya Handilsskúli eftir búskaparfrøðingum at undirvísa í støddfrøði og búskaparligum lærugreinum á HH og FHS í Tórshavn frá 1. august 2009. Talan er antin um tíðaravmarkað starv skúlaárið 2009/2010 ella um fast starv, um umsøkjari hevur útbúgving, sum hóskar til tørv skúlans.



Hesir tímar eru leysir at søkja (tímatølini standa í klombrum og eru vegleiðandi):
- Altjóða búskapur B (10 t/v)
- Støddfrøði C, B (15 t/v)
- Sølubúskapur C, B, A (21 t/v)
- Virkisbúskapur C, B (9 t/v)

**Formlig førleikakrøv:**
- At undirvísa á C-stigi krevst viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella onnur hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan.
- At undirvísa á A- og B-stigi krevst viðkomandi útbúgving á master-stigi ella onnur hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan.

**Setanarkor til fast starv:**
Tvey tey fyrstu árini verða roknað sum royndartíð. Lærarar, sum verða settir í fast starv, hava skyldu at undirvísa í teimum lærugreinum, teir hava førleika til, og mugu vera til reiðar at fara undir námsfrøðilga útbúgving.

**Løn:**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Umsóknin skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 27. apríl 2009.
Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Olav Absalonsen ella Sonju Oyrabø Petersen á telefon 317177, teldupostur: oa@hsh.fo ella sp@hsh.fo.

FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 31 71 77
Telefax 31 33 74

www.fh.fo

Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 300 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH), sum er ein 3-ára gymnasial útbúgving, og umleið 200 á grundútbúgving innan Fyrisiting, Handil og Skrivstovu (FHS), sum tekur eitt ár, og gevur atgongd til lærlingasútbúgving og til 2-ára HH, har FHS telur sum tað fyrsta árið av trimum. Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast umleið 35 lærarar og á Kambsdali umleið 30. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri skrivstovulærlinga- og handilslærlingaútbúgving og fyri hægri útbúgvingum sum HD og akademiútbúgving.

FØROYA HANDILSSKÚLI

SENDISTOVAN